# Uppsagnir hjá Arctic Food

Tey 60 fólkini, sum arbeiða á landingarmiðstøðunum hjá grønlendska felagnum Arctic Seafood, hava fingið uppsagnarbræv, og somu boð hevur felagið givið teimum umleið 300 útróðrarmonnunum, sum plaga at avreiða til landingarmiðstøðirnar. Leiðslan sigur uppsagnirnar vera neyðugar og eina beinleiðis avleiðing av, at landsstýrið hevur skert stuðulin til felagið úr 17 niður í 8 milliónir kónur í ár. Tønnes Berthelsen, stjóri í Arctic Food, sigur við KNR, at tað er upp til politikararnar at gera av, um útróðrarmenninir í níggju bygdum skulu hava eitt stað at avreiða til.



*– Generelt haldi eg at tað er ein góður eginleiki hjá einum leiðara, at hann dugir, torir og tímir at taka øðrvísi og kanska á tann hátt nýskapandi avgerðir, sigur Andras Róin, sum varð valdur Ársins Leiðari 2007. Komandi fríggjadag verða Ársins Leiðarar í ár valdir*

hevur nakað av tí, sum hesir tríggir stjórarnir hava; nevniliga tað "ótradisjonella". men er tað neyðugt at vera øðrvísi fyri at vera ein góður leiðari?

– Ja, generelt haldi eg at tað er ein góður eginleiki hjá einum leiðara, at hann dugir, torir og tímir at taka øðrvísi og kanska á tann hátt nýskapandi avgerðir, sigur Andras Róin.

Starvslýsingin, har tað bleiv sagt, at Føroya Tele var ein fyritøka, har tað ikki varð lagt nakað í, hvønn húðarlit og hvønn átrúnað fólk høvdu, eins og seksuella støðan hjá fólki ikki var nakað, sum fyritøkan blandaði seg uppí, var eitt dømi um øðrvísi arbeiðshátt, men talan var ikki um eina provokatión, staðfestir Andras:

– Tað var ikki meiningin við starvslýsingini at provokera nakran. Hon var prentað í teirri tíðini, tá kjakið um grein 266b í revsilógini var upp á tað heitasta, men eg vil framvegis siga, at talan ikki var um eina útsøgn, sum skuldi arga. Tað var hinvegin talan um nøkur virðir, sum í hasum føri Føroya Tele skuldi standa fyri, men samstundis virðir, sum eg haldi at alt tað føroyska samfelagið eigur at taka undir við, sigur Andras Róin.

## Broytti skap

Tey 11 árini, Andras Róin sat sum stjóri hjá Telefonverk Føroya Løgtins, seinni Føroya Tele, hendi stórar broytingar.

– Eg upplivdi at vera við til at flyta Føroya Tele frá einari almennari mannfólka verkfrøðingaverð, kunnu vit siga, til at eina meiri akademiska verð, har kunningartøkni og búskapur vóru í hásæti, minnist Andras.

– Kappingin á teleøkinum gav okkum eitt spark í dintilin tann rætta vegin. Tað hevði ikki verið nóg mikið at spælt kapping – altso ímynda sær eina støðu, har Føroya Tele ikki var einsamalt á marknaðinum – tað, at aðrir útbjóðarar komu á føroyska marknaðin, gjørdi, at vit máttu og skuldu broyta fyritøkuna, sigur Andras Róin og leggur afturat.

– Ikki fyrr enn kapping er verulig, skilja øll starvsfólkini, at tað nyttar einki at ganga runt og gera sítt arbeiði hálvgott. Skal mann klára seg í einari kappingarstøðu, er neyðugt at gera sítt besta allatíðina.

## Bankar mugu kenna ábyrgd

Í dag arbeiðir Andras Róin við at ráðgeva fyritøkum í m.a. leiðslu, og í tí sambandi hevur búskapur sín stóra leiklut. Fíggjarkreppan spælir sjálvsagt í hesum høpi eisini við, men hendan kreppa er ikki bara ósunn, heldur Andras Róin.

– Fíggjarkreppan er kanska sunn í so máta, at hon er við til at fáa fólk niður á jørðina aftur. Eg ivist nevniliga í, um tey fingu tað betri av at fáa sær størri bilar, hús ella bátar. Men tað er bara ótrúliga harmiligt at fólk koma í óføri, sigur hann og sendir síðani eina heilsu til peningastovnarnar:

– Tað er einki at ivast í, at bankarnir hava ein medábyrgd av fíggjarkreppuni. Teir hava aktivt spælt við í hesum "sikussinum", og tí er tað eisini natúrligt at teir taka sín part á seg, og royna at halda út. Tíðirnar verða betri, og ein banki eigur tí at skipa sítt virksemi á tann hátt, at tað gongur út yvir so fá fólk sum gjørligt, sigur Andras Róin.

*»Bankarnir hava aktivt spælt við í hesum »sikussinum«, og tí er tað natúrligt at teir taka sín part á seg.«*

*Andras Róin um fíggjarkreppuna*

# – Mær dámar væl at leiða



*Ársins Leiðari í fjør varð Christian Nagata, stjóri fyri NEMA-samtakið.*

**FAKTA**

**Grundgevingar fyri at velja Christian Nagata til Ársins leiðari 2008:**
Christian hugsar nýtt og ótradisjonelt. Jantelógin er eitt ókent fyribrigdi hjá honum og hann dugir væl at hava "fleiri bóltar í luftini" í senn.

**Í fjør varð Christian Nagata, stjóri hjá NEMA-samtakinum, valdur Ársins Leiðari. – Eg arbeiði ikki framímóti at gerast ársins hetta ella hitt, men mær dámar væl leiðsludesiplina, og heiðurin kann tí kanska metast sum ein viðurkenning av, at eg ikki eri heilt av leið, sigur hann**

ÁRSINS LEIÐARADAGUR
*Leif Láadal*

– Tað er eitt sindur løgið við hesum ársins tiltøkunum, men mær dámar væl at mann setur fokus á leiðslu sum arbeiðsamboð, sigur Christian Nagata, stjóri hjá Nema-samtakinum, ið varð valdur Ársins Leiðari í 2008.

Orsøkin til, at hann fegnast um serliga fakliga partin av einum tiltaki, sum "Leiðaradagurin", er at hann manglar í Føroyum.

– Fyri at menna føroyskt vinnulív og leiðslu sum heild, er neyðugt at hoyra, hvussu onnur gera og hvussu tey gera í øðrum londum, og tað er tí hesin partur, sum eg fegnist um í sambandi við slík tiltøk. At mann so verður valdur til Ársins Leiðara, hevur samanborið við fakliga partin, ikki so nógv upp á seg, sigur Christian Nagata.

## Fokusera í ringum tíðum

Sjálvt um tað bara er eitt ár síðani Christian Nagata var valdur til Ársins Leiðari, eru tíðirnar nógv broyttar. Tað er kanska ikki for nógv at siga, at tíðirnar eru nógv verri í dag enn fyri 12 mánaðum síðani, men tá tað snýr seg um leiðslu, verður mann noyddur at taka øll tíðarskeið við, sigur Christian Nagata.

– At leiða eina fyritøku, merkir at tú skalt leiða hana í skiftandi tíðum, og tí má ein góður leiðari hava tey amboð, sum skulu til fyri at leiða bæði tá tað gongur framá og afturá, sigur hann.

Heilt ítøkiliga er sjálvsagt munur á, hvussu arbeiðið verður skipað í teimum ymsu tíðarskeiðunum. Í góðum tíðum snýr ta seg um at ekspandera, meðan tað snýr seg um at konsolidera í ringum tíðum, heldur Christian Nagata.

– Tú kanst harafturat siga, at tær ringu tíðirnar noyða leiðslurnar at fokusera internt – hyggja allar mannagongdir eftir í seyminum og koma við uppskotum til, hvussu arbeiðið kann gerast uppaftur betri. Hetta arbeiðið hevur lætt við at liggja eftir, tá tíðirnar eru góðar, og hjólini mæla skjótt, sigur stjórin.